SINNISBATI

Tórshavn, 05. februar 2020

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn

Hoyringsskriv viðvíkjandi Løgtingsmál nr. xx/201x: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin) (Landssvik og onnur brotsverk móti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a., brotsverk ímóti stýrisskipanini og landsmyndugleikum føroyinganna, yvirgangur o.a., alvandasom brotsverk, ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin, bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi og brotsverk í familjuni).

Í Sinnisbata taka vit undir við dagføring av revsilógina, soleiðis at hon verður tillagað føroysk viðurskifti í enn størri mun og nútímansgerast. Hetta merkir sostatt eisini, at atlitið til borgarar, ið hava sinnisligar avbjóðingar, líðingar og sjúkur verður munandi størri. Hetta fyri at vit lúka øllum altjóða støðum, krøvum og sáttmálum, Føroyar hava bundið seg til.

Sinnisbati hevur fylgjandi viðmerkingar til broytingaruppskotið:

§ 189. Viðvíkjandi víðarisølu av heilvági og sjúkufyribyrgjandi evnum, ynskir Sinnisbati at vísa á persónar við sinnisligum avbjóðingum í somu førum má takast størri atlit til, tí talan er um at taka skynsamar avgerðir í lívinum. Summi kunnu koma út í støður, har tey vegna teirra sinnisligu viðvæmu støðu ella sjúku, kunnu koma út í óføri uttan at vera tilvitað um avleiðingarnar av hendingunum eftirfylgjandi. Við hesum verður ikki sagt, at ein ikki skal hava revsing, tá ein hevur gjørt eitt brotsverk, men tað hevur týdning, at skipanin hyggur nágreiniligt eftir, hvørji fólk tað snýr seg um, og hvørja støðu, tey eru í. Ein annar partur av sama vandamáli er, at persónar, sum hava hava sinnisligar avbjóðingar og/ella rúsevnistrupulleikar kunnu enda í einari støðu, at tey fáa vanliga fongsilrevsing, har eitt psykiatriskt viðgerðatilboð í summu førum kundi verið meira hóskandi. Neyðugt er at taka øll atlit til, hvørjar avleiðingar fongsulrevsing kann hava fyri menniskju við sinnisligum avbjóðingum, og um har eru tilboð, sum eru betri egnað. Hetta eisini sæð í ljósinum av, at ungum við dupult diagnosum, har vantandi tilboð eru, og har sum ein vanliga fongsulsrevsing kann vera beinleiðis skaðilig. Ein kann í summum førum vera í ivi um, um brot verður á altjóða sáttmálum, tá fólk sinnisligum sjúkum eru í vanligum varðhaldi og onkuntíð somuleiðis í isolatión í fongslinum. Hetta tykist vera vegna plásstrot ella manglandi lækna fakliga manning, men slík viðurskifti kunnu als ikki góðtakast í ein danskari ella føroyskari rættarskipan, sum hevur bundið seg til altjóða sáttmálar og mannarættindi.

Aðrar viðmerkingar til revsilógina sum heild:

SINNISBATI

Sinnisbati er av teirri fatan, at tað hjá føroyskum fangum hevði verið best hóskandi, at fingið neyðuga kunning áðrenn ein fongsilsrevsing, eitt nú við at vita heilt neyvt, hvat fyri eitt fongsul føroyskir fangar verða sendir til, tá teir skulu sita teirra dóm í einum donskum fongsli. Eina slíka skipan hevur Grønland, sum í mong ár hevur havt siðvenju fyri at senda fangar í varðhald í Herstedvester á Sjællandi í Danmark. Har eru sjálvsagt fyrimunir og vansar við einari slíkari skipan, men serliga hjá fangum við dupult diagnosum, kann tað at vita frammanundan, hvat umhvørvi ein kemur í, vera ein fyrimunur. Eisini hjá teimum avvarðandi. Fyrimunurin kann somuleiðis verða, at viðkomandi er í einum umhvørvi, sum kennir til føroysk viðuskifti í størri mun. Kriminalforsorgin í Føroyum og avvarðandi fongsil kunnu sostatt eisini á tann hátt skapa eitt sterkari og betri samskrifti um føroysku fangarnar. Sinnisbati mælir til, at kannað verður, um slík skipan kundi verið hóskandi fyri føroyskar fangar og fyri rættartrygdina hjá føroyingum.

Vegna Sinnisbata,

Róa Midjord, forkvinna

Laura K. Apol, aðalskrivari